Hetta er politikkurin

Hendrik Thomsen
Javna›arvalevni

Um eg skuldi veri› valdur í Tórshavnar b‡-rá›, vil eg arbei›a fyri hesum málum.

1. Meira umsorgan fyri teimum gomlu, sum í dag liggja meira og minni í hjálparloysi. Fleiri samb‡lir skulu útvegast, og røktin økjast.
2. Skapa bú›sta›ar-møguleikar til skúla-ungdómin. Bygging av skúlaheimum, har les-andi og lærlingar kunnu búgva fyri sámuligan prís. Landi› og kom-munurnar, sum var›a av ungdómunum, skuldu veri› saman um hesa bygging
3. Arbei›a fyri, at tann privati leigu-markna›urin verur skipa›ur solei›is, at ta› er trygt og ó›d‡rt fyri leigarin. Og at hetta skattliga loysir seg fyri eigaran
4.Møguleikar skulu finnast fyri bygging av íbú›um, sum fólk kunnu leiga ella partvís eiga fyri ein rímuligan prís.
5. Arbei›a fyri, at tey sum ikki sjálvi eru før fyri at útvega sær ein bú›sta›, fáa eitt sta›, har tey kunnu føla seg heima. Her má hatturin takast av fyri Frelsunar-herinum, Blákross-heiminum, og stu›ul veitast, so tey kunnu halda fram
6. Fleiri vegastrekkir eru heilt óforsvarlig, nú fer›slan er vor›in so nógv. Her kann nevnast Var›agøta, Hospitals-svingi› og onnur strekki›, sum eru sera hættislig, her má okkurt henda beinanvegin.
7. Geva øllum børn-um ein ansingarmøgu-leika sum foreldur og børn kunnu ver›a trygg vi›
8.Spælipláss skulu gerast, so børn kunnu spæla uttan at ver›a í vanda og til ampa fyri fer›sluna.
9. Møguleikar skulu skapast fyri longdari foreldrafarloyvi í sam-band vi› barnsbur›
10. Havnini tørvar ein barnalækna, sum kann taka sær av teim-um smáu, sum ikki eru før fyri at grei›a frá hvat í feilar.

VI‹MERKINGAR

Kommunalt sjálvsst‡ri

Hallbjørg Hansen
Fuglafjr›i

Ta› hava seinastu árini ver-i› nógv uppskot frammi um hvussu kommunurnar í Føroyum skulu skipast. Kommununevndin, sett av landsst‡rinum, leg›i í 1998 fram álit um n‡ggja komm-unu-skipan. Hendan leg›i upp til stórar broytingar av uppgávu- og ábyrgdarb‡ti-num millum land og kommunur. Hetta tyktist ikki vinna serligan frama nakrasta›ni, og hava a›rar loysnir sí›ani veri› nevnd-ar, so sum økisrá› og hvat nú alt ver›ur kalla›.

Undirrita›a heldur, at ta› er í hvussu so er eitt stig á rættari lei›, at uppgávur, sum vi›koma lokal-samfel-agnum ver›a lagdar út til kommunurnar at umsita. Eg haldi at vit skulu lata vera vi› at tosa um økisrá›. Kommunurnar hava fingi› barnaansingina, og vóni eg, at eldrarøktin ver›ur yvir-tikin komandi ár. Ta› sigur seg sjálvt, at myndugleikar-nir á sta›num áttu at veri teir næstu til at sæ› hes-ar uppgávurnar sum sínar at loysa.

Onkur hevur funnist at, at landsst‡ri› í uppskoti til fíggjarlóg hevur bo›a› frá, at nakrar av uppgáv-unum á sosiala økinum ver›a fluttar til kommunurnar. Hetta kundi kanska veri› frábo›a› á annan hátt, men vilja vit heilsa hesum poli-tikki vælkomnum.

Ta› skuldi ikki veri› or-søk at sagt frá, at vi› hesari gongd er ney›ugt, at kommunur partur av skattainntøkunum má vaksa alt me›an landskass-ans partur minkar samsvar-andi.

Her eru stórar avbjó›ing-ar til verandi og komandi kommunust‡rir, serliga har kommunurnar ikki eru so stórar, men eri eg tó púra vís í, at har viljin er, letur hetta seg væl gera, og at ta›

ber væl til at samarbei›a um tær uppgávur, sum kommunurnar enn eru ov smáar til at loysa hvør í sín-um lagi.

Vit eru í hvussu so er fús til at fyrireika okkara kommunu til at taka okkum av øllum vi›urskiftum, i› vi›víkja okkara borgarum.

Hetta, saman vi› einari skilagó›ari fíggjarligari st‡ring, er gongda lei›in til størri kommunalt sjálv-st‡ri.

Lokalt ræ›i› skapar fólkaræ›i.

Seksæringurin

Gunnar Mohr,
Sambandsvalevni

Í mong ár hava havnarfólk fjó›ra hvørt ár valt 13 borg-arar í Tórshavnar b‡rá. Tey, i› lata seg stilla upp, eru á lista hjá politiskum flokkum.

B‡rá›sarbei›i hevur stø›i í kommunalpolitikki og ikki partapolitikki, hetta er samansetingin av skift-andi samgongum besta prógv um.

Ein seksæringur er manna›ur vi› 13 kvinn-um/monnum : 12 vi› áranar og ein aftur í rong. Tá í› ró› ver›ur, er umrá›andi, at manningin er gó›, og at ein sterk og køn hond heldur um st‡risvølin. Gott áralag gevur gó›an og vakran ró›ur.

Ta› ber til at sammeta hesa lítlu mynd vi› okkara b‡rá, til ta› er sera umrá›-andi, at teir 13 b‡rá›slimir-nir - tólv, i› rógva, og ein (b‡rá›sforma›urin) vi› st‡risvølin - duga at finna

ró›rarlag, sum er treyt fyri trivna›i og frambur›i í okkara b‡i.

Og ta› er ikki minni um-rá›andi, at b‡rá›smanning-in er skikka› at manna tey mongu f‡ra-og fimmmann-afør, sum vit, vi› myndini um seksæringin, hóskandi kunnu kalla allar tær mongu nevndirnar, i› b‡-rá›slimirnir skullu manna.

Um vit velja ta røttu manningina i okkara b‡rá, skuldi ikki sta›i› á at fing-i› eitt 4 - ára langt b‡rá›s-arbei›i, vi› gó›um og menn-andi arbei›i.

Tessvegna er ta› umrá›-andi at hugsa seg væl um, á›renn krossurin ver›ur settur.

Sunnur politikkur í sunn-um b‡i.

Hei›irligheit Rei›iligheit Var›semi - Sparsemi

Schumann Hjaltalin,
b‡rá›slimur, valevni fyri Sambandsflokkin

Ta› sum hevur veri› eitt av a›aley›kenninum hjá sam-bandsflokkinum er hei›ir-ligheit, rei›iligheit var›-semi og sparsemi. Flokkur-in hevur ikki altí› liva upp til hetta heiti , men vil gera alt sum er møguligt at fylgja hesum setningi.

Longu nú er so nógv lova av teimum ymisku valevnu-num til Tórshavar B‡rá›, at eg nú ver›i noyddur at siga frá at ein stórur partur av tí, sum er lova› ikki er møgu-ligt at gjøgnumføra vi› tí inntøkugrudarlagi, sum kommunan hevur.

Um so ver›ur, at eg veri aftur valdur so dugi eg at síggja, at ta› m.a. kemur at falla í mín tunga lut at ver›a ein av teimum sum komu at siga nei til nógv av ørvitisætlanunum hjá fleiri av valevnunum. Tí skal ætl-an teirra eydanst má skatt-urin hækkast fleiri fer›ir og ta› ver›ur ikki vi› mínari hjálp.

Ta› er ógvuliga hugstoytt at lesa allar greinaranar har lova› ver›ur gull og grønar skógir. Tí sum minnast kreppuárini, minnast hvussu trupult ta› var hjá kommununi, vinnilívinum og einstaklinginum, at fáa endarnar at røkka saman.

Ta› má tí ver›a eitt minsta krav til tey, sum lova ba›i eitt og anna›, at tey samstundis grei›a okkum frá hvar peningurin kemur frá. Eitt nú kundi hesi marglatis valevni sagt okk-um, at skatturin eigur at hækka ella at onkur skerj-ing eigur at vera gjørd. Ta› er als ikki møguligt at loysa øll mál í komandi b‡rá›s-setu.

Veljarin eigur at fáa grei› bo› um hann skal gjalda meira ella um hann missur a›rar tænastur.

Íbú›artrot – óney›ugt vi› langari bí›ití›

Høgni Mikkelsen
valevni Sambandsfloksins til Tórshavnar B‡rá›

Nú hoyra vit aftur í fjøl-mi›lunum at b‡rá›i› skal gera eina stóra útstykking í Hoyvíkshaganum, sum skal hava vi› sær, at íbú›artrot-i› í Havnini skal minka.

Sum flestu kunnugt var henda ætlan gjørd í 80'u-num, og vit eru nú í 2000, og hví skulu vit hoyra um ta› nú? Jú sjálvandi! Tí b‡-rá›sval er fyri framman.

Ta› sum eg haldi vera logi› er, hví b‡rá›i› ikki kann hava eina lidna verk-ætlan liggjandi klára aftaná so nógv ár, og nú bí›ilistin nærkast teimum 200 siga teir, at henda verkætlan skal ver›a li›ug í apríl 2002. (Gud viti hvussu langur bí›ilistin er tá)?

Ta› kann vera, at veljar-arnir trúgva tí, men ta› geri eg ikki!

Ta› átti at veri› gjørt í fleiri byggistigum, so at ta› kundi veri› skjótari, og har-vi› kundu familjur v. m. skjótari fingi› tak yvir høvdi›.

Nú havi eg gjørt nakrar smærri og størri útstykk-ingar í Havnini og í Hoy-

vík, og eitt kann eg siga tykkum veljarum, at hev›i ta› gingi› líka seint hjá mær sum hjá b‡rá›num, so hev›i eg langt sí›ani veri› farin á húsagang.

Vi› hjálp frá gó›um og dugnaligum fólki havi eg fingi› nógvar og drúgvar roydir innan byggivinnu-na, sum íbúgvarnir í Havn, Kaldbak og Kollafir›i kundu fingi› nyttu av, um eg bleiv valdur.

Mynd: Jens Kristian Vang

Tingfundir aftur í tinghúsinum

Seinasta hósdag setti Finnbogi Ísakson, tingforma›ur, fyrsta tingfundin í n‡umvælda tinghúsi-num

Søguligur tingfundur
John Johannessen

Hósdagin í farnu viku savn-a›ust tingfólk fyri fyrstu fer› í n‡umvælda tinghúsi-num, sum uttan er vor›i› ein stásilig b‡armynd.

Finnbogi Ísakson, ting-forma›ur, setti tingfundin klokkan hálvgum tvey seinnapartin. Tingsalurin var nærum fullur hendan hósdagin 2. november ár 2000. Á tingfundinum var bert ein av teimum 32 ting-sessunum tómur. Hetta var sessurin hjá Jógvani Djur-huus, løgtingsmanni fyri Tjó›veldisflokkin.

Av landsst‡rissessunum vóru allir manna›ir, uttan sessurin hjá Tórbjørn Jac-obsen, landsst‡rismanni í undirvísingar- og mentamálum.

Fundurin var ikki drúgv-ur, hóast heili sjey mál vóru á dagsskránni. Talan var bert um atkvø›ugrei›slur.

Fyrst á skránni var val av løgtingsins umbo›smanni. Forma›urin mælti til at velja Joen H. Andreassen, sorenskrivara, til fyrsta løg-tingsins umbo›smann í Føroya søgu. Hesin var› valdur vi› 31 atkvø›um fyri, ongari blankari og ongari ímóti.

Næstu fimm málini vóru atkvø›ugrei›slur um fyri-spurningar, og var› í øllum førum samtykt, at fyri-spurningarnir skuldu svar-ast.

Á›renn framløguna hjá løgtingsformanninum var› sí›ani atkvøtt vi› a›ru vi›-ger› um sams‡ning og løn til løgtingsins umbo›s-mann. Samtykt var› vi› 31 atkvø›um fyri, ongari blankari og ongari ímóti, at løgtingsins umbo›sma›ur skal lønast eftir 40. lønar-flokki. Uppskoti› fór so-statt samtykt til tri›ju vi›-ger›.

Tá tingfundurin var li›-ugur klokkan 13.40 stilla›u ting- og landsst‡risfólk upp uttan fyri tinghúsi›, so Sos-ialurin kundi taka fyrstu felagsmyndina av løgtingi-num uttan fyri n‡ggja ting-húsi›.

Ting- og landsst‡risfólk uttan fyri Løgtingi› 2. november 2000:

Aftast:
Óli Breckmann, Finnur Helmsdal, Ey›un Elttør, landsst‡risma›ur, Jákup Sverri Kass, Karsten Hansen, landsst‡risma›-ur, Jóannes Eidesgaard, Tórbjørn Jacobsen, landsst‡risma›ur, Hans Pauli Strøm, Bjarni Djur-holm, landsst‡risma›ur, Jákup Suni Joensen.

Anna› ra›:
Kristian Magnussen, Páll á Reynatúgvu, Alfred Olsen, Sámal Petur í Grund, Marjus Dam, Flemming Mikkelsen, Hergeir Nielsen, Jógvan Lützen, Jóanis Nielsen, Henrik Old, Rúna Sivert-sen, Jógvan á Lakjuni.

Fremst:
Annita á Frí›riksmørk, He›in Mortensen, Hans Tausen Olsen, Vilhelm Johannesen, Edmund Jo-ensen, Finnbogi Ísakson, tingforma›ur, Heini O. Heinesen, Ey›un Viderø, Finnbogi Arge, Katrin Dahl Jakobsen og Lis-beth L. Petersen



Ni›ara myndir s‡nir tinghúsi›, sum ta› sá út í fimmtiárunum